**UTTANRÍKIS og MENTAMÁLARÁÐIÐ**

# Fyrstilærari í Skúlanum á Fossánesi

**Uttanríkis- og mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í fólkaskúlanum**

Starvið sum fyrstilærari í Skúlanum á Fossánesi verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2020. Í Skúlanum á Fossánesi eru 30 næmingar í 1. - 7. árgangi innskrivaðir næsta skúlaár. Tríggir lærarar og tveir stuðlar í tíðaravmarkaðum starvi umframt fyrstalæraran starvast í skúlanum.

## Um starvið

Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans og fíggjarstýringini. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

## Førleikakrøv

- Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum fólkaskúlalærarar og starvsroyndir í fólkaskúlanum.
- Tað er ein fyrimunur at hava leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving innan leiðslu
- Harumframt skulu umsøkjarar hava áhuga fyri avbjóðingum og førleika at taka neyðugar avgerðir

## Setanarviðurskifti

Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Skúlanum á Fossánesi. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.2 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

## Umsóknir

Umsókn saman við avriti av lærarauprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2020.

## Umsóknin verður stílað til:

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279, 110 Tórshavn
ella við t-posti:
ummr@ummr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja ella skriva til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044, t-postur: jenny@ummr.fo.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál, gransking og uttanríkismál. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og frítíðarvirksemi.*